# Maersk Air fingið kreppuhjálp

**Danska flogfelagið Maerks Air hevur nýliga fingið 400 milliónir krónur innskotnar frá móðurfelagnum A.P. Møller. Samlaða íleggið er í ár komið upp á 700 milliónir krónur**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Fíggjarligu trupulleikarnir hjá Maersk Air eru nú loystir, sigur kuningarstjórin í felangum, sum fegnast um, at nú verður arbeiðsfriður hjá starvsfólkinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

A.P. Møller hevur lagt 400 milliónir krónur í flogfelagið Maersk Air. Tað skal enn einaferð steðgað gitingunum um, at A.P. Møller ætlar at niðurleggja flogfelagið.

Maersk Air hevur seinnu tíðina verið í rættiligari trongstøðu fíggjarliga. Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá felagnum, sum umframt vanlig ferðafók eisini hevur mist stórar charterkundar sum eitt nú Star Tours, ið brúkti Maersk Air til at flúgva gestir sínar suðureftir.

Maersk Air hevur tvey tey seinstu árini havt eitt samlað hall upp á 638 milliónir krónur, og sum útlitini eru í løtuni, er mest líkt til, at tað aftur í ár verður hall á roknskapinum hjá felagnum.

Fyrr í ár setti A.P. Møller aðrar 300 milliónir í flogfelagið, so samlaða innskotið í ár er upp á heilar 700 miliónir krónur.

Nógvar gitingar hava veið frammi um, at A.P. Møller er í ferð við at sleppa sær av við flogfelagið. Men líka ofta, sum hesi tíðindi eru farin at ganga, hevur leiðslan í Maersk Air avsannað tey.

### Nýggjur stjóri

Tann 1. november tók stjórin í grønlendska flogfelagnum Air Greenland, Finn Øelund, við starvi í Maersk Air, og á nýggjárinum loysir hann Flemming Ipsen av sum forstjóra. Finn Øelund hevur eisini fleiri ferðir í danskari pressu lagt eina við, at hann er ikki settur at taka Mersk Air av, men at fáa felagið aftur á flog. Og við teimum nógvu pengunum, sum A.P. Møller nú brúkar upp á flogfelagið, er ymiskt, sum bendir á, at so er.

Hr. Møller, sum gamli leiðarin í fyritøkuni, Mærsk McKinney Møller, dagliga verður nevndur, er annars kendur fyri at kappa høvdið av øllum, sum ikki kastar pengar av sær.

Maersk Air er eisini býtt í tvey. Maersk Air tekur sær av sjálvari flogferðsluni, og eitt annað felag, Maersk Aircraft, eigur partar av flogfarsflotanum.

Hetta, at felagið er býtt sundur soleiðis, hevur eisini sett gongd í gitingarnar um, at arbeitt verður við at taka felagið av.

Men nevndarformaðurin í Maersk Air, Bent Erik Carlsen, sigur við danska blaðið Berlignske Tidende, at tað er nakað tvass.

### Vend í

Per Brinch, kunningarstjóri hjá Maersk Air, sigur við Sosialin, at við hesum seinna íkastinum hevur A.P. Møller greitt boðað frá, at fyritøkan heldur fast um flogfelgið.

– Eginpeningurin hjá Maersk Air hevur alla tíðian verið positivur, sigur Per Brinch. Tað, sum hesin peningurin skal brúkast til, er tap av søluni av felagnum Maersk Air Ltd. í Englandi, sum Maersk Air átti, men sum gekk illa og varð selt við stórum halli. Og tað passar eisini til hugsunarháttin hjá Hr. Møller, at tað, sum ikki gevur vinning, skal ein sleppa sær av við. Umframt eru rætitliga nógvir pengar brúktir til niðurskirivng av nýggu flogførum felagsins, sigur kunningarstjórin hjá Maersk Air.

Felagið Maersk Aricraft, sum eigur flogførini, er dótturfelag hjá Maersk Air og er stovnað av roknskapartekniskum grundum.

Per Brinch sigur, at í Maersk Air fegnast tey nú um at hava fingið arbeiðsfrið, og at tey nú líta frameftir. Botnurin er náddur, heldur hann, og nú gongur hinvegin aftur. Hall hevur verið seinnu árini, men tað er nú minkað munandi, sigur Per Brinch.

Tað at Star Tours ikki longur er kundi hjá Maersk Air, hevur so gjørt, at fleiri flogfør eru tøk at brúka aðrastaðni, sigur kunningarstjórin. Fýra flogfør eru leigað út til charterflúgving í summar, og arbeitt verður alla tíðina við at seta á stovn nýggjar rutur, sigur hann.

Flogførini hjá Maersk Air fara eisini í framtíðini at verða at síggja á flogvøllinum í Vágum.

Til jóla verða sjey eykaflogfør á Føroyarutuni, sigur Per Brinch. Fimm úr Keypmannahavn og tvey úr Billund.

# Kórsangur í Miðvágs kirkju



**Sunnudagin, sum er fyrsti sunnudagur í advent, fer Vágakórið at luttaka í guðstænastuni í Miðvágs kirkju**

Sum siður hevur verið seinnu árini, fer Vágakórið aftur í ár at luttaka undir guðstænastuni í Miðvági fyrsta sunnudag í advent, sum verður komandi sunnudag.

Vanligt hevur verið seinnu árini, at Vágakórið syngur nakrar sálmar undir guðstænastuni í Miðvági fyrsta sunnudag í advent. Soleiðis verður eisini í ár, siga tey úr kórinum.

Umframt kórsangin verður eisini kornettónleikur at hoyra saman við orglinum í Miðvágs kirkju sunnudagin.

Katrin Jørgensen fer at spæla okkurt lag á kornett, eins og hon fer at spæla undir til sálmasangin saman við urguleikaranum Jón Eiriki Joensen.

Í vetur er tað Ólavur Hátún, sum stjórnar Vágakórinum

**ej**

# Fáir sjómansskúlanæmingar

**Fáir næmingar hava boðað frá, at teir ætla sær á Føroya Sjómansskúla næsta ár. Tað er ikki óvanligt, at fráboðanir koma seint, sigur stjórin**

UNDIRVÍSING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Tað eru fáir næmingar tilmeldaðir Føroya Sjómansskúla komandi skeið. Í onkrum flokki eru bara einir tveir innskrivaðir enn.

Men tað er einki óvanligt, at fráboðanir koma seint til skúlan, sigur stjórin á Føroya Sjómansskúla, Dánjal Johan Poulsen. Tað er føroyinginum so líkt at koma í seinna enda, heldur hann, so hann væntar ikki, at skúlin fer at standa tómur, tá skúlaárið byrjar.

Tað er eingin vanlukka í tí, at næmingarnir eru nakað seinir at melda til, hóast tað í ár tykist vera heldur slakari, en undanfarin ár hava verið.

– Hóast teir mangan eru seinir, tykist tað í ár at vera heldur slakari enn vanligt kortini, sigur Dánjal Johan Poulsen.

Tað er eingin tilmeldingarfreist á Føroya Sjómansskúla, so næmingar, sum hava meldað til, áðrenn byrjað verður, sleppa við til undirvísingina, sigur stjórin.

– Tað er einki farið av tíð, so hatta er heldur einki at vera bangin fyri. Og tað skal vera undalrigt, um ikki onkur kemur afturat, sigur hann.



# Føroyar í ódn og logn

**Er tað rætt, at veðrið var betri fyrr? Ella er tað rætt og slætt nostalgi, sum fær fólk at halda tað? Kanska finnur tú svarið í bókini »Veður og tíðindi 1875-2002« eftir Petur Skeel, sum kom út í gjár. Sólin skein meira fyrr, vísir hon millum annað. Men hon er samstundis tað longsta yvirlitsverkið yvir nýggja søgu higartil**

VEÐURSØGA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, hevur við bók síni latið fleiri hurðar upp. Bæði aftur í tíðina og til fólk at finna nýggjar samanhangir til framtíðina*
*Mynd: Jens K. Vang*

Øll tosa um veðrið. Petur Skeel Jacobsen ger nakað við tað.

Mikudagin varð ein sjáldsom bók útgivin í hansara navni. Hon er um veður og tíðindi í Føroyum frá 1875-2002. Eitt sjáldsamt yvirlitsverk, sum bæði lýsir veður og vind og úrval av føroyskum tíðundum í 128 ár. Føroyingar, sum elska at tosa um veðrið og gamlar dagar, hava rættiliga fingið nakað at práta um.

Bókin er tríbýtt. Hvør opna viðger eitt ávíst ár. Á vinstru síðu eru veðurhagtøl fyri hvørt árið sær, sum okkara egni Petur Skeel Jacobsen hevur viðgjørt. Á høgru síðu eru tíðindi, sum Petur Skeel Jacobsen partvíst hevur skrivað, og Finnbogi Ísakson hevur ritstjórnað, tikið burturúr og lagt afturat. Harafturat eru søguligar myndir, sum Alan Brockie hevur fingið til vega og tikið sjálvur.

Til ber at lesa um mesta hita, miðal hita, minsta hita og avfall mánað fyri mánað og ár fyri ár. Tú fært eisini yvirlit yvir frost, mjørka og storm. Og so fært tú enntá at vita, hvørjar ættir hava verið flestar eitt árið.

### Samanhangandi søga

Eitt eru veðurhagtølini, sum í sjálvum sær eru eitt slóðbrótandi arbeiði. Her verður nógv av tí, sum fólk halda seg vita, skjalprógvað, váttað ella avsannað. Harafturat kemur tekstsíðan, sum er úrval av tíðindum, sum hava verið frammi tað árið. Tíðindini eru ikki vald eftir nakrari meginreglu, men okkurt serliga áhugavert er tikið fram. Ein mynd er eisini til hvørt árið, og í hvørjum einasta føri er skrivað um sjálva myndina.

– Hetta er óivað størsta samanhangandi tíðindayvirlit, skrivað á føroyskum, yvir hendingar fyri ár fyri ár eitt so langt tíðarskeið. Nógvar vanlukkur eru nevndar fyrstu árini, og tað hava óivað verið høvuðstíðindini tá eins og nú, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Fyri tað harrans árið 1903, síggja vit eitt nú, at Niels Finsen fekk Nobelheiðurslønina í læknafrøði fyri gransking sína í strálum móti koppasjúku. »Færøsk Politik« eftir Jóannes Patursson kom út. Tað fyrsta politiska felagið »Føroya Framburðsfelag« varð stovnað. Havnar Hornorkestur var stovnað. Og Kvívíkar kirkja varð vígd. Alt tað hendi fyri júst 100 árum síðan.

Á myndasíðuni síggja vit eitt nú fiskimenn á veg til Íslands, Klaksvíksstríðið, mótmælisgongu á Vaglinum og jólaódnina í 1988, sum Finnbogi Ísakson hevur spunnið eina enda burturúr.

### Nostalgi passar

Men aftur til veðrið, sum alt snýr seg um. Í bókini er eisini eitt yvirlit yvir allar stormdagar síðan 1872. Eftir øllum at døma vóru fleiri stormar fyrr, men tað komst av, at mátitólni ikki vóru so neyv tá. Váttað verður, at jólaódnin í 1988, tá viðarlundin í Havn lá skerfløt og heil hús fóru av grundini, var tann ringasta í 20. øld.

Petur Skeel Jacobsen heldur, at tað er áhugavert at fylgja veðrinum so langt aftur í tíðina, tí eingin, sum livdi tá, er eftir at siga frá.

– Broytingarnar eru ikki stórar, men nakrar broytingar hava verið. Skal roknast eftir sóltímum, hevur veðrið verið vánaligast í sjeytiárunum. Verður hitin roknaður sum veðurmát, og tíðarskeiðið verður býtt sundur í 30 ára skeið, er broytingin ikki stór burtursæð frá einum tíðarskeiði. Miðalitin hevur verið 6,5 stig, men tíðarskeiðið frá 1935-64 var tó heitari. Tá vóru 7,1 stig í miðal, greiður Petur Skeel frá.

Men hóast smáar broytingar søguliga sæð, er tað kanska nakað um tað, sum fólk flest halda, at veðrið varð betri fyrr. Serliga tá ið tey vóru smá.

– Vit síggja, at sóltímarnir fækka í tali og gerast færri, sum árini líða, undantikið í 2000, sum var sjáldsama sólríkt. Annars hevur miðaltalið á sóltímum verið javnt fallandi frá 1922 til 1981, men síðan hevur verið frægari. Verður hugt eftir sóltímunum í 10 ára skeiðum sæst, at vit høvdu 140 sóltímar færri um árið í sjeytiárunum enn í tjúgunum, sigur Petur Skeel Jacobsen.

### Ríkt samstarv

Bókin hevur verið leingi í umbúna. Hugskotið kom í 1996, og fyrimyndin er bókin »Det danske vejr i 100 år«. Talan er um samstarv millum Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunn.

– Vit sóu bókina á bókamessu, spurdu Petur Skeel, sum beinanvegin játtaði at vera við. Hetta er stórarbeiði. Fyrst ætlaðu vit, at hon skuldi fevna um stórthundrað ár, men tíðin fór við okkum, og so gjørdu vit av at fara heilt fram til dagin í dag, so hon gjørdist meiri fullfíggjað. Hetta er ein sjáldsom bók, og forlagið er fegið um bókina, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari á BFL.

Bókin liggur á markinum millum bøkur til undirhalds og bøkur til skúlabrúks, og tí er Føroya Skúlabókagrunnur eisini við.

– Talan er um dokumentatión av data, og tí eru vit eisini við. Tað ber til at lesa annað burturúr henni, og tað ber til at kanna og lesa samanhangir av ymiskum slag. Tí er hon góð til at gera undirvísingartilfar burturúr, sigur Heðin Klein, leiðari á Skúlabókagrunninum.

Bókin »Veður og tíðindi í Føroyum 1875-2002 er 286 síður. Hon er umbrotin hjá Hestprent og kostar 290 krónur.

## Dálking gevur lýggjari veður og minni sól

**Síðstu tíðina er vorðið væl lýggjari í veðrinum, men samstundis sæst, at sóltímarnir støðugt eru fækkaðir. Dálkingin er orsøkin, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sum er bókaaktuellur**

VEÐURLAG
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Broytingarnar eru ikki stórar, men tendensurin er har. Vit fara ov illa um okkara jørð.

Miðalhitin hevur ligið rættiliga støðugur á 6,5 stig um árið í miðal. Men mátingar, sum eru gjørdar frá august í fjør til august í ár vísa eina árligan miðalhita á 8 hitastig. Annars vísa hagtølini í bókini »Veður og tíðindi í Føroyum 1875-2002«, at sóltímarnir fækka. Árini 1922 til 1931 vóru í miðal 961 sóltímar um árið. Árini 1992 til 2001 høvdu vit 865 sóltímar um árið. Ella umleið 100 tímar færri.

Færri sóldagar og lýggjari veður ljóðar sum ein andsøgn. Men tað er skil í galskapinum, greiður Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, frá.

– Dálkingin hevur nógv at siga. Hitin sleppur ikki burtur av vakstrarhúsárininum, og tað verður ov heitt. Tað er ein orsøk til stóru affaldsólukkurnar, vit hava sæð síðstu árini, tí heitari luft inniheldur meiri vatn. Í fjør skolaði nógv av Europa burtur, tí luftin var so heit av vatninnihaldi, sigur Petur Skeel Jacobsen.

Tað er altso skeivt at halda, at vit gerast meiri sólbrún, tí vit fáa fleiri hitastig. Sólin sæst nevniliga ikki fyri berari dálking, um vit gera nógv av.

– Luftin verður heitari, og meiri vatn er í luftini. Skýggini bera vatnið, og tí fáa vit færri sóltímar, greiður Petur Skeel Jacobsen frá.